Størv

# Avgreiðslufólk

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir avgreiðslufólkum til farmastøðina í Tórshavn.

**Uppgávurnar hjá farmaflutningsdeildini**
Høvuðsuppgávan hjá farmastøðini, sum er undir farmaflutningsdeildini, er at samskipa, viðlíkahalda og menna farmaflutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum.

**Uppgávurnar hjá avgreiðslunum**
Høvuðsuppgávurnar hjá avgreiðslufólkunum eru at vera við til at:
- Fylgja uppgávum, málsetningum o.ø. fyri farmastøðina
- Tryggja gott samstarv við kundar, myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Vegleiða og upplýsa kundar

**Førleikakrøv**
- Koyrikort til lastbil/trailara
- Trukkprógv
- Góðan røkjuskap
- Kundavinarligur

**Setanartreytir**
Størvini verða sett eftir høvuðssáttmálanum hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 15. februar 2002.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343061 ella post: hab@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

# Kappróðrarneystið á Glyvrum

verður tikið alment í nýtslu leygardagin
9. februar kl. 15.00

Kappróðrarfelagið vil takka hjartaliga fyri dyggan stuðul frá einstaklingum, virkjum og handlum, sum hava stuðla okkum í sambandi við byggjan av neysti og nýggjum bátum. Enn einaferð hjartaliga tøkk øll somul.



**Skrá fyri dagin:**

kl. 10.00 Aðalfundur hjá kappróðrarfelagnum við vanligari dagsskrá
kl. 15.00 Almenn móttøka. Eystankórið og Mannskórið luttaka
kl. 16.30 Uppboðsøla av 20 málningum og myndum sum polittikara og lokal fólk hava málað
kl. 20.30 Veitsla í neystinum har øll eru hjartaliga vælkomin. Tekningarlistar liggja frammi í Statoil og Kiosk Vár. Undirhald við Hilmar Jan Hansen. Ragnar Nesstein spælir til dansin

*Við kappróðrarkvøðu*

**Kappróðrarfelagið N.S.Í.**

Nevndin

Lesið Sosialin

Nú í hesum kalda veðrinum kom og fá tær heitt kaffi ella heita suppu út við

MENU

PITABREYÐ v/ oksakjøt 55,-
TOAST v/ salat 25,-
SUPPA & BREYÐ 35,-
Allir 3 rættirnir kunnu keypast við út úr húsinum

Frá mánadegnum 4. februar er opið soleiðis:
Mánadag - hósdag 12.00-24.00
Fríggjadag - leygardag 12.00-01.00
Sunnudag 14.00-24.00

livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234

Sosialurin
Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk

Í BÝIN
- HVONN HÓSDAG



# Politiið í Runavík nýtt telefonnummar

Politistøðin í Runavík hevur fingið nýtt telefonnummar og nýtt telefaxnummar.

Nýggju numrini eru:

**telefon 471448**
**telefax 471449**

Fyrstu tíðina vegleiður ein telefonsvarari, um tygum av óvart hava ringt til gomlu numrini.

Kristjan Martin Joensen
sýslumaður fg.

# Føroya Fornminnissavn

**Framsýningin hjá Føroya Fornminnissavni** í Brekkutúni 6 er afturlatin fyri almenninginum, meðan arbeitt verður at leggja nýggjar trygdarskipanir inn.

Væntandi verður latið upp aftur í mai.

**Føroya Fornminnissavn**
Kúrdalsvegur 2, Hoyvík,
Postboks 1155, FO-110 Tórshavn,
tlf. 310700, fax 312259,
e-mail: fornminn@natmus.fo

# Arbeiðslið til gongubreytirnar

## hjá Klaksvíkar kommunu

**Kommunan fer at skipa eitt arbeiðslið (gongubreytatoymi) undir vegadeildini, sum skal røkja gongubreytirnar í býnum. Í hesum sambandi eru tvey størv á vegadeildini hervið leys at søkja, eitt sum handverkari ella líknandi, og eitt sum arbeiðsfólk.**

**Arbeiðssetningur, bygnaður o.a.:**
Arbeiðið fevnir um dagliga umsiting av kommunalum gongubreytum og gongugeilum, so sum umvæling av betongkantum og asfalti, nýgerð serliga í eldri økjum, ymiskt viðlíkahald, reingerð, kavagrevstur av gongugeilum og trappum o.a.m. Ætlanin er ikki, at nýggja toymið skal yvirtaka størri gongubreytaarbeiði, sum vanliga er partur av kommunalari útbjóðing.

Gongubreytartoymi hevur tilvísing til formannin á vegadeildini og til eitt starvsfólk á Teknisku Umsiting. Roknast skal við, at handverkarin, ið verður dagligur leiðari, verður við í setanini av arbeiðsfólkinum.

Av amboðum, ið eru tøk til arbeiðið hjá toyminum kunnu nevnast: ein lítil lastvognur, ein lítil gravimaskina og nýggja »gongubreytamaskinan«.

**Persónligir førleikar:**
Vit sóknast eftir tveimum fólkum, við neyðugum førleika til at røkja arbeiðið, sum er nevnt omanfyri.

Handverkarin, ið verður dagligur leiðari, skal helst vera útbúgvin handverkari, ella hava aðra viðkomandi útbúgving. Arbeiðsfólkið nýtist ikki at vera yrkislært, men skal helst hava royndir á økinum.

**Tímaløntu størvini verða sett skjótast tilber, og lønin verður sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.**
**Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Andras Joensen vegformann á tlf. 217388 ella Hans Fróða Hansen á Teknisku Umsiting á tlf. 456388.**

Umsóknir, saman við upplýsingum útbúgving, royndum og møguligum viðmælum v.m., verða at senda til:

**Klaksvíkar býráð**
Postsmoga 2
700 Klaksvík

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2002.

**Klaksvíkar Býráð**
tlf. 456388 · telefax 456399

Sosialurin
-tað loysir seg

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3313
Navn: Sp/f Faroe Clean
Adressa: Reynsgøta 39, 160 Argir
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 01.11.2001
Viðtøkudato: 01.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Doris Vang Rasmussen, Reynsgøta 39, 160 Argir og Kristian Dahl, Reynsgøta 39, 160 Argir.
Stjórn: Kristian Dahl, Reynsgøta 39, 160 Argir.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Dánial Petur Dam, Heiðagøta 5, 160 Argir.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at keypa og selja sanitetsútgerð og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 6. februar 2002

Kristin Balle

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lýsið við brúktum bilum
Sosialurin

# Hús/íbúð ynskist

Vegna eitt av starvsfólkum okkara søkja vit eftir hampuliga stórari íbúð ella húsum í Tórshavn ella nærhendis.

Audi
**Bilasølan v/ Øssur Johannesen**
Tlf. 315354

**Norðstreymoyar Javnaðarfelag**

# Uppstillingarfundur

1. uppstillingarfundur til løgtingsvalið verður í Bjargingarfelagshúsinum í Kollafirði **sunnudagin 10. februar kl. 20°°.**

**Nevndin**

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundur Skála Handverkarafelags verður fríggjadagin 22.02.2002. Tíð og stað verður lýst seinni.

Skrá sambært lógum felagsins.

Allir limir eiga at møta.

**Nevndin**
**Skála Handverkarafelag**

Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg